Heimatíðindi

# Nógv nýta ferðatryggingar um summarið




RUTH WINTHER POULSEN | 2018-07-17 15:07

Hetta merkja tey hjá tryggingarfeløgunum í landinum, tá endurgjald skal latast.

Bæði hjá Betri trygging og Trygd hava tey úr at gera um summari, tá tað er høgtíð fyri ferðir til og úr Føroyum. Tað ger eisini, at hetta er tann tíðin, tá tað verður givið mest endurgjald fyri seinkingar í flogferðsluni.

Brian Smedemark er stjóri í Trygd, og tey merkja av álvara, at veðrið ikki hevur verið tað besta at flúgva í seinastu dagarnar.

-Beint nú hava vit úr at gera, tí tað hevur verið mjørki og og avlýsingar í flogferðsluni. Og tað er høvuðsárstíð, fólk ferðast ordiliga nógv beint nú, so tað ger, at tað eru bæði avlýsingar og seinkingar.

Tað er serliga um summari og um jóltíðir, at endurgjald verður latið fyri seinkaðar flogferðir.

**Endurgjald verður latið, tá ferðin er seinkað**

Um ein hevur ferðatrygging, veita tryggingarfeløgini endurgjald, tá flogferðin til ella úr Føroyum er meira enn átta tímar seinkað. Tá fær tann ferðandi 1000 krónur í endurgjaldi um dagin, í mesta lagi fýra dagar.

Hjá Betri trygging merkja tey eisini, at tað eru nógvar seinkingar, nú mjørki hevur ligið seinastu dagarnar, og tað eru nógv, sum gera sær dælt av ferðatryggingini

-Tey allarflestu, sum eru seinkaði í meira enn 8 tímar verða kunnaði um tað bæði frá okkum, tá tey ringja inn til okkum og eisini frá flogfelagnum. Tað eru nógv, sum gera brúk av tí, tá tað t.d. er mjørki ella órógv er í ferðsluni, sigur Petur Elias Petersen, leiðari á privatkundatryggingini hjá Betri

Hann vísur eisini á tryggingarappina hjá Betri trygging, sum kann nýtast at søkja um endurgjald, tá ferðin er seinkað.

-Um tú situr í Kastrup og ferðin er seinkað meira enn 8 tímar, so kanst tú gera tað via eina app, sum vit hava og soleiðis fráboða tað beinan vegin. Tú tekur mynd av røttu skjølunum, sum skulu til, og so veita vit endurgjald.